# Ein tunnil ger ikki

**SAMBAND** Hitin skal ikki langt niður ímóti frostmarkinum, fyrrenn boðað verður frá hálku ella kava um Gjáarskarð. Hetta vita gjáarfólk, og hava tí í mong ár ynskt sær betri og tryggari vegasamband. - Vit hava framvegis ein tunnil sum okkara størsta ynski. Og vit vóna, at hetta ynskið verður framt skjótt, sigur gjáarmaðurin, Sofus Johannesen. Hann býr við Gjógv og arbeiðir í Havn

Snorri Brend

**Gjógv:** - Tað er altavgerandi í framtíðar samfelagnum, at man altíð kann koma til og frá, eisini um veturin, vísir Sofus á.

Tey, ið eru uppvaksin við Gjógv, eru von við hetta vegastrekkið frá og til bygdina. Men tað eru kortini mong onnur, sum hava ilt við at venja seg við umstøðurnar at koyra um fjøll og skarð á vetrartíð.

- Tí er tað altavgerandi at betra um hesar umstøður. Tað gera vit best og bert við einum tunli, slær hann rimmarfast.

Men so leggur Sofus sjálvrannsakandi aftrat:

- Vit skulu heldur ikki vera so bláoygd at halda, at við einum tunli er alt bjargað. Tað er tað ikki. Tað krevst annað og meira til tað!



» Kanska onkur finnur útav, at tað ber væl til at búgva í bygdini og tískil vera her størri part av árinum?

SOFUS JOHANNESEN, GJÓGV

**KOYRILÍKINDI**

*Vegurin um Gjáarskarð er tann, ið man vera oftast nevndur, tá talan er um koyrilíkindini kring landið. Her royna týsk ferðafólk við bit og slit at koma niðan á skarðið á summardekkum ein mikudag í oktober mánaði 2010. Ein tunnil hevði lætt munandi um hjá teimum og mongum øðrum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Stór bygd

Hyggur mann eftir gongdini við fólkatalinum við Gjógv, so var bygdin ein miðal stór bygd fyrr í tíðini.

Tá vóru tíðirnar øðrvísi: Fólk livdu av tí, sum jørðin og havið góvu, og í so máta lá bygdin væl fyri. Væl av jørð hoyrir til bygdina, og bygdin liggur nær við Norðhavið við sínum fiskiríkidømi.

Men tíðirnar eru broyttar. Undir krígnum var fólkatalið við Gjógv uppi á tí hægsta, 284 fólk. Men eftir kríggið byrjaðu fólk at flyta frá teimum smáu bygdunum móti størri plássum, og bygdin minkaði støðugt í 50', 60' og 70'unum. Nú búgva bert 40 fólk við Gjógv.

Hvussu framtíðin fer at laga seg fyri eina slíka bygd sum Gjógv, kann mann bara gita um.

- Eg rokni tó ikki við, at tað eru nøkur, ið velja at búseta seg á einum slíkum plássi. Eitt týdningarmikið tak í so máta er at fáa betri nøktandi vegasamband til bygdina, vísir gjáarmaðurin á.

Skal hetta gerast veruleiki, er í øllum førum neyðugt at skapa samanhald millum tey, ið búgva í bygdini, - tað er: at bygdin hevur nøkur felags átøk, ið øll taka lut í.

## Samanhald

Sum nevnt aðrastaðni í blaðnum hevur bygdin fostrað mong mentanarfólkini. Og haraftrat finnast eisini feløg, ið hava trivist væl við Gjógv.

Eitt teirra er felagið Gjómaður. Hetta felagið hevur gjørt fleiri átøk at varðveita gomul minnir í bygdini, so sum kráir, gróthús og annað. Felagið hevur endurreist bæði kráir og gróthús, og til hesi tiltøk hava nógv fólk savnast, bæði fólk, ið búgva við Gjógv, og fólk við tilknýti til bygdina.

- Júst tað haldi eg hevur stóran týdning fyri trivnaðin í eini bygd, at fólk verða savnað um felags átøk.

- Hetta er eitt evni, ið vit eiga at gera meira við, - ikki bert at varðveita gomul minnir, men eisini at fríðka um og skapa hugna í bygdini, vísir Sofus Johannesen á.

Hetta kann mann gera, við at savna fólk nakrar leygardagar at leggja sjálvbodna arbeiðsmegi í hesi átøk, so at tey gerast góð við úrslitið og kenna tað sum teirra og vilja gera alt fyri at varðveita tað og ikki lata tað fara fyri einki í vanrøkt.

- Á hinum bógnum síggja vit ofta ymiskt, sum man fær kommununa at gera.

- Men tá tað er gjørt, so verður tað ikki viðlíkahildið nóg væl og fellur at enda í órøkt, tí ongin rættiliga kennir ábyrgd fyri tí, og tí at bygdarfólkið ikki kennir tað sum sítt, vísir hann á.

## Heilsárs bygd

Sofus Johannesen er sannførdur